# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**ROVER 827 COUPE DE LUXE AUTOMATIC**
Árg Apríl 1998, Km 28.000. Top modell: Bert koyrt 28.000km Klimaanlegg- Leðurinntrekk- Sóltak- El. rútar- El. spegl- Fj. Stýrt Centrallás-Radio-Alufelgur-Spoylarar v.m. **Sertilboð uttan bil í býti kr. 188.000,00**



**KIA CARNIVAL 2.9 HPDI EX MODEL**
Árg Mars 2002, Km 195.000. Top modellið: Aircondition-Automatgear-Regnsensor-El. stýrt førarasetur-El rútar fr.+ aftan-El.spegl-Fjarð stýrt centrallás-Hita í forrúti-C.D.anlegg-Mjørkal.-Leður róður v.m. **Uttan býtisbil: 188.800,-**



**KIA SEPHIA II 1.5 SLX**
Árg Apr. 1999, Km 72.600. El.rútar.fr.- Radio v.bandspælara v.m. **Uttan býtibil tilboð kr. 75.000,00**



**OPEL ASTRA 1.6 STC. VØRUVOGNUR**
Árg Apr. 1999, Km 28.000. Bert koyrt: 28.000 km-Fjarðstýrt Centrallás-Radio v.Bandspælara-Takboylar v.m. **Uttan býtibil tilboð kr. 65.000,00**



**KIA CARENS 2.0 TURBO DIESEL**
Árg Sep.2002, Km 19.000. Aircondition-Alufelgur-Leður betrekk-Sleipikrók-Fjarðstýrt Centrallás-El. Rútar-El. Spegl v.m. (Alufelgur-Leður-krókur eykaútstýr) **Tilboð uttan býtibil kr. 188.000,00.**



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AWD STATIONCAR. »4 HJÓLSTREKK«**
Árg Mars 1998, Km 63.000. Bakkisensor - 4 WD v/Reduktiónsgear -Fjarðstýrt centrallás-El.rútar-El-spegl-C.D.Anlegg v.m. **Tilboð uttan býtibil kr. 108.000,00**



**ROVER 620 TURBO INJECTION >>> 200 HK <<<**
Árg Juli 1999, Km 94.000. Top modellið: 200 HK Turbo -Leður Inntrekk-Sóltak-Aircondition Alufelgur-C.D.Anlegg v.m. **Tilboð uttan býtibil kr. 156.000,00.**



**LAST TIL PICK UP BILAR**
Sum nýggj Pick up Last við síðulúkum / aftan ( MVG fæst aftur av prísinum) . **Kr. 3.500.**

Pf. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**


Eystara Bryggja · P.O. Box 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf 34 59 60 · Fax 34 59 52 · cargo@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM



ÍSLAND ▪ FØROYAR ▪ HETLAND ▪ NOREG ▪ DANMARK

HIN FØROYSKA FARMALOYSNIN



...ein skeiv avgerð kann kosta nógv!

Vit syrgja fyri at vøran kemur fram til tíðina og í heilum líki, so títt umdømi er óskalað.

SKJÓTLEIKI | TRYGGLEIKI | FØRLEIKI | SMIDLEIKI

Farmur fluttur við ferðafólkaferju, hevur nógvar eyðsýndar fyrimunir við sær.

Umframt tað, at farmurin kemur skjótt fram á mál, so tryggjar skynsama »koyr-inn« og »koyr-út« skipanin farminum eina skjóta og lagaliga avskiping uttan óneyðugar ristingar og harðliga handfaring.

Orsøkirnar eru nógvar til at ringja **34 59 60.**

Í Danmark hava vit farmastøðir í Kolding, Hedehusene og Hanstholm. Tú kanst lata vøruna inn í Hanstholm leygardag, so hon er í Tórshavn longu mánamorgun.

Latið trygt vørurnar í okkara kønu hendur.

**Okkara styrki...**

- **bóking á fráfaringardegnum**
- **stuttar innlatingarfreistir**
- **útgerð til allan farm**
- **flyta køli- frysti- og turrlastir**
- **tollavgreiðsla fyri kundan**
- **kappingarførir prísir**
- **høgt tænastustøði**
- **stutt transittíð**

***trygt, skjótt, lætt og gott...***
***...Smyril Line Cargo – SKILAGOTT***



www. Sosialurin .fo


# Bilar

Nr. 196 • hósdagur • 14. oktober 2004 • 78. árg.

Mercedes Benz Vito:

## Ársins vørubilur í Evropa 2005

**Ein dómsnevnd av flutningsbilajournalistum frá fleiri ymiskum londum hevur kosið Mercedes-Benz Vito til ársins vørubilur í Evropa, "Van of the Year 2005". Vito vann upp á t.d. komfort, góðar koyrieginleikar og sera umfatandi vøruskrá**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mercedes-Benz Vito er kosin ársins vørubilur í Evropa, "Van of the Year 2005". Grundgevingarnar vóru t.d at bilurin líkur øll krøv til ein vørubil, samstundis sum hann er sum ein persónbilur at koyra. Eisini designið fekk góðan karakter.

Modellskráin er víðkað nógv í mun til forgangaran, og Vito fæst í trimum karossarílongdum, við høgum og lágum taki og við fleiri ymiskum motorum frá 88 til 218 hk.

Peter Wiemann, talsmaður fyri dómsnevndina í "Van of the Year 2005" sigur, at stórt sæð allir kundar kunnu fáa ein bil, sum passar til teirra flutningstørv. Eisini hevur Vito eina av bestu tænastuorganisatiónum á marknaðinum aftan fyri seg.



*Mercedes-Benz Vito er kosin "Van of the Year 2005". Forgangarin fekk sama heiður, tá hann kom á marknaðin í 1996*



Scania R-serian:

## "International Truck of the Year 2005"

**Ein dómsnevnd upp á 18 leiðandi lasbilajournalistar hevur kosið Scania R sum "International Truck of the Year 2005". Í grundgevingum sínum søgdu teir m.a. at nógv var gjørt burtur komfortinum, og bilurin var sera framkomin í allar mátar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Á stóru transportmessuni í Hannover, ið er ein av heimsins størstu innan lastbilar, páhangsvognar o.l. bleiv Scania R tann 21. september 2004 kosin "International Truck of the Year 2005"

Nýggi Scania R avloysir 4-seriuna, sum hevur verið á marknaðinum síðan 1996.

Í grundgevingum sínum fyri at velja Scania R segði dómsnevndin t.d., at teir vóru ovfarnir av, hvussu nógv var gjørt burtur úr komfortinum hjá bilførarанum, og hvussu framkomin bilurin var í allar mátar.

Instrumentborðið er ergonomiskt rætt, og kontaktir og handtøk sita sera væl fyri hjá bilføraranum. Eisini eru setrini framúr góð.

Motorarnir lúka eisini tey strangastu umhvørviskrøvini.

Hjá Scania umboðnum í Føroyum, Berg Motors, fegnast tey um heiðurin, Scania hevur fingið og stóra áhugan fyri bilinum.



*Scania R-serian bleiv tann 21. september 2004 kosin "International Truck of the Year 2005"*

## C-klassin mest seldur



C-klassin hjá Mercedes-Benz var tann mest seldi luksusbilurin í august 2004, verður upplýst frá Mercedes. Síðan núverandi modell kom á marknaðin í 2000 eru seldir 1,5 milliónir bilar um allan heim

*Kelda: Motor Magasinet*

## BMW í München



Í München byggja BMW eina 25.000 fermetrar stóra bilútleveringsmiðstøð við síðuna av tí kenda høvuðssætinum, tætt við Olympia Stadion. Eftir ætlan skulu leverast 250-300 bilar dagliga og roknað verður við umleið 850.000 vitjandi um árið

*Kelda: Motor Magasinet*

## C3 við Stop & Go



Citroën C3 koma nú við Stop & Go systeminum, har motorurin steðgar, tá bilurin stendur stillur í t.d. eini kø ella bíðar við ferðsluljós. Systemið virkar saman við Senso-Drive automat/manuellu girunum. Stop & Go sparir upp til 10 prosent í brennievni

*Kelda: Motor Magasinet*